Talvið hesa vikuna

Vinnarin av almenna bólkinum í FM á Giljanesi, varð klaksvíkingurin Finnbjørn Vang. Hann fullførdi tí favorittrolluna til fulnar, men sandavágsmaðurin Bernhard Augustinussen gav honum harða mótstøða og fekk loksins eitt annað pláss.

Talvið hesa vikuna er frá seinasta umfarinum, har Finnbjørn hitti vestmenningin Jón Mikkelsen. Finnbjørn telvaði sig spakuliga til avgerandi fyrimun, men djúpt inni í endatalvinum leikti Finnbjørn ein feil, sum Jón ikki gjørdi sær dælt av og tapti fáar leikir seinni.

Finnbjørn Vang (1995) – Jón Mikkelsen (1646)
FM 2002 á Giljanesi (Almenni bólkurin, 8. umfar)

1.e4 e5 2.Rif3 Ric6 3.Bc4 Bc5 4.c3 Rif6 5.0-0 d6 6.d4 exd4 7.cxd4 Bb6 8.Ric3 Bg4 9.d5 Rie5 10.Be2 Rixf3+ 11.Bxf3 Fd7 12.Bg5 Bxf3 13.Fxf3 Fg4 14.Fxg4 Rixg4 15.Rac1 Kd7 16.h3 Rie5 17.Ria4 f6 18.Bh4 Rhe8 19.Bg3 Rid3 20.Rc4 Ric5 21.Rixc5+ Bxc5 22.Re1 b5 23.Rc2 a5 24.Kf1 g5 25.f3 h5 26.Rec1 Rec8 27.Bf2 Bxf2 28.Kxf2 Ra6 29.Rc6 Rxc6 30.Rxc6 a4 31.Ke3 Rg8 32.Ra6 g4 33.hxg4 hxg4 34.Ra5 gxf3 35.gxf3 Rb8 36.Ra7 f5 37.exf5 Re8+ 38.Kd4 Re2 39.f6 Ke8 40.Rxc7 Rxb2 41.Ke4 Rxa2 42.Kf5 Rf2 43.f7+ Kf8 44.Ke6? (Kg6 vinnur) Rxf3? (Kg7! bjargar ótrúligt nokk svørtu støðuni) 45.Rc8+ Kg7 46.Rg8+

2nd Atlantic Weekend

Í døgunum 8-12. maj verður sterk kapping – fyriskipað av føroyingi – í Keypmannahavn, har flestu av okkara elitutelvarum luttaka

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Á heimliga økinum er lítil steðgur í landstelvingini, eftir ein hendingarríkan vetur við eitt nú eini rød av barnakappingum, sum vóru sera væl móttiknar millum ung í Føroyum.

Feløg kring Føroyar halda tó enn fram við talvundirvísing fyri børnum, eins og summar innafelagskappingar eru í gongd.

Á flatlondum verður tó ikki heilt steðgað á enn. Arild Rimestad úr Talvfelagnum Føroyar skipar nevnliga fyri stórari kapping, nevnd 2nd Atlantic Weekend. Fyrsta kapping fór av bakkastokki í fjør, og ætlanin er at hon skal vera afturvendandi. Sum tað sæst á kappingarheitinum, so stuðlar Atlantic Airways kappingina, sum verður í døgunum 8-12. maj.

Fleiri av okkara sterkastu talvútisetum luttaka, eitt nú John Arni Nilssen og Heini Olsen. Eisini sterkir danskir telvarar hava boðað frá luttøku, eitt nú GM Carsten Høi, sum vann kappingina í fjør, eins og fleiri útlendingar hava hoyrt frænir um kappingina.

Føroyameistarin møguliga við

Tað sum er mest gleðiligt, er at nakrir heimabúgvandi føroyingar møguliga ætla sær til Keypmannarhavnar hesar dagarnar at vísa talvútisetum talvkynstur teirra. Talan er um føroyameistaran Hans Kristian Simonsen, Ólavur Simonsen og Rana Nolsøe. Tó kann tað enn ikki sigast við vissu, um allir hesir loksins verða á luttakaralistanum, men nærum við vissu kann sigast at Ólavur Simonsen luttekur.

Virðislønirnar eru frálíkar. Fleiri ferðaseðlar hevur Atlantic Airways burturlutað.

Um fleiri føroyingar ætla sær eitt langt talvvikuskifti í Keypmannahavn, so er seinasta freist at tekna seg 30. apríl, við at senda ein teldupost til arild@talv.dk. Fleiri upplýsingar um kappingar eru á www.faroechess.com.

Styrkt Talvfelag Føroyar

Seinast í mars mánaða hevði Talvfelagið Føroyar aðalfund, har nýggj nevnd bleiv vald og sær hon nú soleiðis út: Formaður: Carl Eli N. Samuelsen, næstformaður; Regin Reinert, kassameistari: Heini Danielsen og skrivari: Heini Olsen.

Á aðalfundinum blivu summi mál loyst. Eitt nú verður Regin Reinert aftur liðformaður á 1. liði, og tað er limir felagsins glaðir fyri.

Nevndin setti sær mál at styrkja enn meir um flaggskipið, 1. lið, og fyri viku síðani bleiv greitt, at IM Nicolaj Borge telvar vid felagnum komandi kappingarár. IM Borge er sera góður telvari, og hevur eitt ratingtal omanfyri 2400.

Tískil eru vónirnar góðar til komandi kappingarár.

Støður uttanlands

Danska superligan

		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Brøndby	28	17	-	7	-	4	61	25	36	58
2	FCK (M)	28	16	-	8	-	4	50	19	31	56
3	AaB	28	14	-	6	-	8	46	37	9	48
4	OB	28	12	-	9	-	7	45	40	5	45
5	FCM	28	11	-	9	-	8	37	24	13	42
6	Esbjerg	28	12	-	5	-	11	38	37	1	41
7	AB	27	9	-	11	-	7	37	29	8	38
8	Viborg	28	9	-	10	-	9	38	37	1	37
9	Vejle	28	6	-	8	-	14	35	62	-27	26
10	Silkeborg	28	6	-	7	-	15	32	40	-8	25
11	AGF	27	4	-	10	-	13	32	45	-13	22
12	Lyngby	28	2	-	8	-	18	21	80	-59	14

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Todi Jónsson (FCK)

Danska 1. deild

		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Køge	21	15	-	3	-	3	45	22	23	48
2	Farum	21	13	-	6	-	2	44	26	18	45
3	HFK Sønderj.	21	13	-	3	-	5	44	34	10	42
4	Frem	21	11	-	7	-	3	43	23	20	40
5	Herfølge	21	10	-	6	-	5	30	22	8	36
6	B 1913	21	10	-	6	-	5	33	27	6	36
7	Randers F.	21	9	-	5	-	7	38	25	13	32
8	AC Horsens	21	8	-	7	-	6	28	23	5	31
9	FC Aarhus	21	7	-	6	-	8	28	32	-4	27
10	Hvidovre	21	5	-	7	-	9	33	39	-6	22
11	Brønshøj	21	5	-	5	-	11	28	41	-13	20
12	B 1909	21	5	-	5	-	11	34	49	-15	20
13	B93	21	5	-	4	-	12	28	45	-17	19
14	Fredericia	21	4	-	6	-	11	26	30	-4	18
15	Kolding FC	21	4	-	4	-	13	32	49	-17	16
16	Skive	21	2	-	4	-	15	22	49	-27	10

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers F.), Óli Johannesen (Hvidovre),
Johan Byrial Hansen (Fredericia)

Norska tippeligan

		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Lyn	2	2	-	0	-	0	3	0	3	6
2	Bodø/Glimt	2	1	-	1	-	0	5	1	4	4
3	Molde	2	1	-	1	-	0	3	1	2	4
4	Moss	2	1	-	1	-	0	4	3	1	4
5	Odd. Grenl.	2	1	-	1	-	0	2	1	1	4
6	Lillestrøm	2	1	-	0	-	1	2	2	0	3
7	Viking	2	1	-	0	-	1	2	2	0	3
8	Sogndal	2	0	-	2	-	0	3	3	0	2
9	Stabæk	2	0	-	2	-	0	1	1	0	2
10	Våleranga	2	0	-	2	-	0	1	1	0	2
11	Start	2	0	-	2	-	0	1	1	0	2
12	Rosenborg (M)	2	0	-	0	-	2	0	3	-3	0
13	Brann	2	0	-	0	-	2	0	3	-3	0
14	Bryne	2	0	-	0	-	2	0	5	-5	0

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)

Hollendska toto-deildin

		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	FC Zwolle +	32	21	-	7	-	4	62	32	30	70
2	Excelsoir +	32	20	-	7	-	5	72	30	42	67
3	RBC Roo'daal	32	20	-	5	-	7	73	37	36	65
4	ADO Den Haag	32	18	-	8	-	6	51	31	20	62
5	Emmen	32	16	-	8	-	8	50	38	12	56
6	FC Volendam	32	14	-	7	-	11	62	46	16	49
7	Cambuur/L. +	32	14	-	6	-	12	47	38	9	48
8	BV Veendam	32	13	-	6	-	13	57	55	2	45
9	Heracles A.	32	13	-	6	-	13	48	48	0	45
10	Storm/Telstar	32	10	-	9	-	13	49	49	0	39
11	Dordrecht '90	31	10	-	9	-	12	57	59	-2	39
12	Haarlem	32	10	-	7	-	15	35	43	-8	37
13	Helmond Sp.	32	8	-	13	-	11	32	46	-14	37
14	MVV	32	9	-	7	-	16	44	56	-12	34
15	VVV	32	10	-	4	-	18	47	63	-16	34
16	G.A. Eagles	31	7	-	9	-	15	40	56	-16	30
17	Eindhoven	32	6	-	7	-	19	45	73	-28	25
18	Top/Oss	32	3	-	5	-	24	23	94	-71	14

Perioduvinnararnir eru merktir »+«
Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

Enska 3. deild

		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Plymouth	46	31	-	9	-	6	71	28	43	102
2	Luton	46	30	-	7	-	9	96	48	48	97
3	Mansfield	46	24	-	7	-	15	72	60	12	79
4	Cheltenham	46	21	-	15	-	10	66	49	17	78
5	Rochdale	46	21	-	15	-	10	65	52	13	78
6	R&D	46	20	-	13	-	13	69	53	16	73
7	Hartlepool	46	20	-	11	-	15	74	48	26	71
8	Scunthorpe	46	19	-	14	-	13	74	56	18	71
9	Shrewsbury	46	20	-	10	-	16	64	53	11	70
10	Kidderm.	46	19	-	9	-	18	56	47	9	66
11	Hull C.	46	16	-	13	-	17	57	51	6	61
12	Southend	46	15	-	13	-	18	51	54	-3	58
13	Macclesfield	46	15	-	13	-	18	41	52	-11	58
14	York	46	16	-	9	-	21	54	67	-13	57
15	Darlington	46	15	-	11	-	20	60	71	-11	56
16	Exeter	46	14	-	13	-	19	48	73	-25	55
17	Carlisle	46	12	-	16	-	18	49	56	-7	52
18	Leyton O.	46	13	-	13	-	20	55	71	-16	52
19	Torquay	46	12	-	15	-	19	46	63	-17	51
20	Swansea	46	13	-	12	-	21	53	77	-24	51
21	Oxford Utd.	46	11	-	14	-	21	53	62	-9	47
22	Lincoln C.	46	10	-	16	-	20	44	62	-18	46
23	Bristol R.	46	11	-	12	-	23	40	60	-20	45
24	Halifax	46	8	-	12	-	26	39	84	-45	36

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull C.)

Nýtt tilfar á www.javnratt.fo

Higartil hava umleið 4200 vitjanir verið á heimasíðuni og er tað nógv meiri enn væntað

JAVNSTØÐA

Átakið 'Fleiri kvinnur á Ting' byrjaði 8. apríl og endar 30. apríl 2002, tá Løgtingval er. Nýtt tilfar hevur verið lagt á heimasíðuna hvørja viku og byrjar seinasta vikan í átakinum mánadagin 22. apríl 2002. Higartil hava umleið 4200 vitjanir verið á heimasíðuni og er tað nógv meiri enn væntað.

Atkvøðugreiðslan á heimasíðuni 'Skulu kvinnur hava fleiri tingsessir?' hevur verið væl vitjað. Pr 21. apríl 2002 høvdu umleið 480 greitt atkvøðu og býta atkvøðurnar seg soleiðis, at 72% siga 'ja', 22% siga 'nei' og 6% siga 'veit ikki'. Hetta býtið hevur verið tað sama, síðani atkvøðugreiðslan byrjaði.

Endamál

Endamálið við átakinum er at lýsa, hví fáar kvinnur eru uppi í politikki og at vísa á nakrar møguleikar, sum kunnu venda gongdini og gera, at talið á tinglimum býtist javnari millum kynuni.

Higartil hava vit fingið tilfar frá 6 flokkum um javnstøðu og frá 30 kvinnuligum valevnum. Teirra meiningar og ætlanir í politikki kunnu lesast undir 'Valevni'.

Úr innihaldinum

Bergtóra Hanusardóttir, forkvinna í Kvinnufelagnum, skrivar grein um kvinnur í politikki og tekur nakrar forðingar fram og lýsir harvið, hví ikki fleiri kvinnur verða valdar í bý- og bygdaráð og á ting. Hon sigur m.a.

"Tey, sum kenna føroysku vallógina, vita, at við slíkum mekanismum verða bert fáar kvinnur valdar. Og hugsa vit um glastakið, tey 36 prosentini sum sambært kynsgranskarum skulu til fyri at kvinnulig umboðan av álvara munar, so er eisini tað eitt argument fyri at gera Føroyar til eitt valdømi, tí sambært Wilmu Rule hava kvinnur kjans í valskipanum, har hvør flokkur fær fleiri fólk vald í hvørjum valdømi".

Annar greinskrivari er Ólavur Rasmussen, prestur, sum byggir sína grein á prædiku, sum varð hildin í Hvalbiar Kirkju herfyri. Hann lýsir, hvussu fordómar kunnu forða okkum í at síggja menniskju, sum tey eru. Hann sigur m.a.

"Kvinnurnar í Jesu lívi umboða júst styrki, bæði kropsliga og andliga. Tær hava intelligens og taka ábyrgd, í mun til lærusveinarnar, sum sviku, uttan undantak. Men kvinnurnar umboða eisini nakað annað, sum er sera týðandi: Tær megna at hugsa um eina felags søk.

Lat meg sitera borgararættindarstríðsmannin Malcom X, hetta eitt sitat, sum kundi verið tikið beint úr Jesu lívi: "At útbúgva eitt mannfólk er at útbúgva ein einstakling, at útbúgva eina kvinnu er at útbúgva eina heila tjóð."

Triðji greinskrivarin er Jan Mortensen úr Vinnuhúsinum, sum skrivar um vinnu og javnstøðu. Hann sigur, at flestu forðingar, sum hava við javnstøðu at gera, eru burturi:

"Í samfelag okkara er nú flestu forðingar fyri at menn og kvinnur kunnu virka javnstøðis ruddaðar av vegnum. Síðsta týðningarmikla stigi var nýggja barsilsskipanin. Hyggja vit at unga ættarliðnum, eru kvinnurnar væl við innan flestu økir.

Tær nema sær útbúgvingar, á sama støði sum hitt kynið. Men enn sýnast tær at hella meira til útbúgvingar innan 'tað bleyta økið'. Av somu orsøk eru kvinnurnar ikki enn væl umboðaðar í leiðandi størvum innan privatu vinnuna. Ein av forðingunum fyri javnstøðu er tí eisini hugburðurin hjá kvinnunum sjálvum."

Spurningurin til føroyingarnar '5 á netinum' hesa vikuna er: Hví heldur tú at summi fólk vilja ikki atkvøða fyri einari kvinnu?

Her kemur ymiskt forvitnisligt fram. Onkur sigur, at slík áskoðan kann vera grundað á fordómar og onkur annar tekur soleiðis til, at tá má talan vera um fólk við eini forbrongladari fatan, av hvat kvinnur eru og kunnu.

Undir "Vert at lesa" er forvitnislig grein, har Bin Laden og Bush verða tiknir fram. Greinskrivarin er Jógvan Mørkøre og sigur hann m.a.:

"Summi vilja vera við, at komandi løgtingsvalið verður mest týðandi valið í nýggjari tíð. Tá verður sum oftast sipað til royndirnar at fáa Føroyum og føroyingum meira sjálvstýri ella fullveldi. Men her stendur eisini so mangt annað upp á spæl. Ikki minst demokrati og javnstøða. Eingin veit við vissu, hvussu stór hóttanin frá hesari ævigu fasismuni er, men tað er øll møgulig grund til at taka hana í álvara. Tað gerst best við at vísa frá sær politikarar, ið royna at ríða á hesum hestinum, og í staðin stuðla teimum, sum hava dirvi at venda sær móti hesum við at verja demokrati og javnstøðu."

Fylgið við í tí nýggjasta innan evnið kvinnur í politikki. Vitjið heimasíðuna hjá Javnstøðunevndini: www.javnratt.fo

Nýggjar bøkur á altjóða bókadegnum

Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út tvær myndabøkur á altjóða bókadegnum 23. apríl

ÚTGÁVA

Bøkurnar, talan er um, eru Teir tríggir bukkarnir Brúsi og Mammur okkara.

Teir tríggir bukkarnir Brúsi, sum Ursula Seeberg endurseglið og teknaði, er millum kendastu og best umtóktu ævintýrini í Norðurlondum.

Fyri nøkrum árum síðan gav Bókadeildin ævintýrið út sum myndabók, men tann útgávan hevur verið útseld í fleiri ár. Nú kemur so nýggj útgáva, ið kenda, danska listakvinnan, Ursula Seeberg, hevur skrivað og teknað. Trøllið er ikki minni grefligt og ljótt á at líta, og nøsin ER veruliga long sum eitt rívuskaft. . .

Pauli Hansen týddi ævintýrið úr donskum. Hann týddi eisini fyrru útgávuna.

Teir tríggir bukkarnir Brúsi er 28 bls. í litum, innbundin og kostar kr. 60. Spf. Hestprent stóð fyri prentgerðini.

Mammur okkara, sum Thomas Svensson hevur skrivað og teknað, snýr seg, sum vera man, um mammur. Jákup, sum vit kenna aftur úr bókunum um Bemblu, hyggur at mammuni, sum gongur við stórum búki, og undrast á, um aðrar mammur, sum eru tær upp á vegin, eru sum mamman. Hvussu við løgreglumammuni, bakaramammuni, sjómansmammuni, kellingamammuni o.s.fr.? Á hvørjari síðu er stuttlig mynd av tjúkkari mammu í onkrum eyðkennisbúna, og niðast stendur stuttur tekstur, ið ber upp á rím. T.d.: Sløkkiliðsmamman búkin kann verma. Barnið spular, tað roynir at herma.

Saman við bókini fylgir eitt klistriark við øllum børnunum. So er bara at finna rætta barnið og klistra tað á rættan búk..

Anna Maria Reinert Jensen hevur týtt bókina, sum er 28 bls. í litum, innbundin og kostar kr. 50. Spf Hestprent stóð fyri prentgerðini.

CAFÉ RÓSAN
á Áarvegnum 14

Café Rósan hevur opið soleiðis til valið:

Flaggdagin 25. apríl kl. 16-19
verður høvi at hitta
Sosialistiskt Ungmannafelag

27., 28. og 29. apríl kl. 16-19.

Valdagin 30. apríl verður opið allan dagin

Caféin bjóðar kaffi, køkur og politiskt tjak

Høvið verður at skifta orð við valevnini

Øll eru hjartaliga vælkomin

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag
&
Sosialistiskt Ungmannafelag